Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Høgni Hoydal, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Tal av læknum, sjúkrarøktarfrøðingum og øðrum heilsustarvsfólki seinastu árini

Spurningar:

1. Hvussu nógv øktist ella minkaði talið av ávikavist læknum, sjúkrarøktarfrøðingum og øðrum heilsustarvsfólki í heilsuverkinum frá september 2011 til september 2015?

2. Hvussu nógv øktist ella minkaði talið av ávikavist læknum, sjúkrarøktarfrøðingum og øðrum heilsustarvsfólki í heilsuverkinum frá september 2015 til september 2019?

3. Hvussu nógv er talið økt ella minkað av ávikavist læknum, sjúkrarøktarfrøðingum og øðrum heilsustarvsfólki í heilsuverkinum frá september 2019 til í dag (frároknað eyka starvsfólk í sambandi við koronu)?

Viðmerkingar:

Herfyri vóru tøl frammi alment frá Hagstovu Føroya um, hvussu nógv talið av serliga læknum og sjúkrarøktarfrøðingum er økt í heilsuverkinum síðani 2010.

Tó varð ikki útgreinað, hvussu gongdin hevur verið í teimum ymsu valskeiðunum og hjá skiftandi landsstýrinum. Tí verður biðið um nágreinilig tøl um gongdina fyri ávikavist:

- tal av læknum,
- tal av sjúkrarøktarfrøðingum
- tal av øðrum heilsustarvsfólki,

sum eru í starvi í føroyska heilsuverkinum í teimum ymsu valskeiðunum.

Korona hevur elvt til ávísa broytta støðu, og tí verður biðið um, at hesi tøl verða drigin frá, so til ber at gera eina sakliga samanbering um gongdina.

Á Løgtingi, 09. november 2021

Høgni Hoydal